# Nøvn

## Føðingar

10. november fingu Barbara á Rógvi og Høgni Reistrup, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3646 gr.

12. november fingu Hedvig og Robert Waagstein, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

17. november fingu Elin Højsted og Eirikur Poulsen, Sandi, eina dóttur. Hon var 50,5 cm long og vigaði 3650 gr.

23. november fingu Gunnrið Finnbjørnsdóttir og Pól Thorsteinsson, Vági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4600 gr.

23. november fingu Ann-Mari Bruun og Jákup Pauli Sigurheim, Sandvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3020 gr.

24. november fingu Rannvá Unadóttir Vestureið og Jakup Nattestad Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3000 gr.

25. november fingu Hilma I. og Regin Anthoniussen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3790.

25. november fingu Hansa og Dia Lamhauge, Syðrugøtu, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3605 gr.

25. november fingu Sheila Hattarstein og Suni Mittún, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3235 gr.

25. november fingu Drós og Silvia ein lítlabeiggja. Hann var 54 cm langur og vigaði 4080 gr. Foreldrini eita Beinta og Hans Arni Olsen og tey búgva í Rituvík.

26. november fingu Hansa Nybo, Viðareiði, og Rói Egholm, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4150 gr.

26. november fingu Jónhild og Bent Djurhuus, Nesi, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4665 gr.

26. november fingu Paula Neshamar og Marius Thomassen, Argjum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3975 gr.

27. november fingu Rakul og Jóan Petur á Stongunum, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3935 gr.

29. november fingu Anita Joensen og Tummas A. Thomassen, Sandavági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3390 gr.

29. november fingu Ingun Joensen, Tórshavn, og Nicodemus Joensen, Skálavík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3550 gr.



Lesið Sosialin so eru tit við

www.ebenezer.fo

SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**



EBENEZER

†

## ANDLÁT

Kunngjørt verður, at elskaði pápi okkara

**Olaf Johansen**
Tórshavn

Andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 1. desember 63 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum heim í Ebenezer fríggjakvøldið kl. 19.00.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 12.00.

***Vegna familjuna***

**Guðrun og Súsanna**

## Minningarorð um pápa mín

# Knud Erik Andersen

**føddur 5. des. 1935, deyður 12. januar 2010**



Góði elskaði pápi

Tungt er at seta seg niður og skriva hesa seinastu heilsan til tín.

Nú jólini nærkast og tað er liðið næstan eitt ár, síðan tú fórt herfrá, ger tað tað ikki lættari. Nógvir tankar mæla runt í høvdinum, og nógvar kenslur eru við. Eitt eru vit sera glað fyri, at Hannis, børnini og eg fingu loyvi til at halda tey seinastu jólini saman við tær. Tað var sera hugnaligt. Tað koma vit ikki at gloyma. Eisini at tú upplivdi okkara brúdleyp í september 2009.

Tú kom sum ungur til Føroya at vitja mammu, men ætlaði bert at verða eina korta tíð fyribils men bleiv í Føroyum í heili 53 ár. Tú fall gott til á Toftum har tú fekk hús og familju, 4 børn, 6 abbabørn og 2 langabbabørn. Tú var eisini væl dámdur, har tú arbeiddi. Altíð hjálpsamur, tá man heitti á teg, og alt tú gjørdi, var væl úr hondum greitt.

Tú var eitt familjumenniskja burturav. Tú gekk høgt uppí merkisdagar og jól, tá tú plagdi at gera dekoratiónir og annað. Tú var sera tolin við okkum børn og gjørdi alt fyri, at vit øll skuldu hava tað gott.

Undir tína sjúkralegu, hvar tú búði nógv av tíðini saman við okkum í Havn, komu vit at kenna teg uppá ein nýggjan máta. Tú var altíð positivur, sjálvt um tú var sjúkur. Tær dámdi væl at hoyra Erik og Lindu spæla uppá ljóðføri og var við til fleiri konsertir har tey luttóku.

Við hesum orðum vilja vit takka tær fyri alt, pápi, sum tú var fyri meg og børnini. Vit koma aldri at gloyma teg, men goyma teg í hjørtunum.

Eg vil eisini takka tær góða mamma, sum hevur verið so trúgv við hansar lið heila lívið og heilt til tað síðsta.

Vit kunnu passandi siga tær farvæl elskaði pápi, verpápi og abbi við fyrsta ørindi av sanginum sum Erik spældi á klarinet fyri fullsettari kirkju til tína jarðarferð.

*Føgur er foldin,*
*dýrdarríkur himin*
*sæl er sálanna jorsalferð*
*um allan heimin*
*um allar ævir,*
*tað syngjandi at himni ber.*

**Katy Knudsdóttir Mortensen**